# Meiri krút í Havnarbátinum enn í øllum hinum

**Talan var um stórt vónbrot hjá nólsoyingum, sum ikki megnaðu at koma fyri seg eftir hálvvánaligan start, og hjá vágbingum, sum á sjálvum málinum mistu fremsta plássið til treystu havnarmenninar**

10-MANNAFØR
*Jóannes Hansen*



*Ein stór sponn var á muni millum Havnarbátin og Vágbingin, tá ið Havnarbáturin tryggjaði sær FM-heitið*

Havnarbáturin fekk í posa og sekk. Undan Ólavsøkuni vóru treytirnar soleiðis, at um tað eydnaðist teimum at vinna, so vóru teir meistarar uttan mun til, hvussu tað hilnaðist hjá nólsoyingum og øllum hinum.

Havnarbáturin syrgdi fyri sær sjálvum. Teir vunnu ársins síðsta kapproður, og harvið vunnu teir FM heitið, sum Havnarbáturin hevur vunnið fleiri ferðir enn nakar annar kappróðrarbátur - í øllum seks kappingunum. Havnarbátinum verður ynskt hjartaliga tillukku við óføra avrikinum.

Tað hevur verið kappast um FM í kappróðri eftir galdandi skipan síðani í 1973. Havnarbáturin var meistari sjey tær fyrstu ferðirnar. Tá ið teir mikudagin tryggjaðu sær FM heitið var tað tólvta ferðin, at Havnarbáturin vann FM. Meistaraskapin hava teir vunnið í 1973, 1974, 1975, 1976, 1977, 1978, 1979, 1990, 1991, 1996, 2001 og so aftur í 2004.

Sjálvandi vóru nólsoyingar vónbrotnir, tá ið teir eftir róðurin hingu niður á árarnar. Teir høvdu ikki tikið av, tá ið teir sjálvir høvdu syrgt fyri møguleikanum at ogna sær fyrsta FM heitið í fimtan ár. Nólsoyingurin hevur ikki vunnið FM síðani í 1989.

Men tað stemmaði ikki hjá Nólsoyinginum hesa ferð. Sum fleiri aðrar ferðir fyrr í ár, so var starturin hjá teimum ikki góður. Tað vísti seg í síðsta enda at kosta alt á stutta róðrarteininum. Nólsoyingurin var leingi á fjórða plássinum. Framvið Molanum royndu teir at gera fleiri royndir at taka tað, sum teir á fyrra partinum av róðrarteininum høvdu mist, aftur. Tað eydnaðist teimum at vinna seg fram á triðja plássið, men teir vunnu seg ongantíð fram á fremsta og næstfremsta plássið.

## Tapararnir

Nólsoyingarnir kendu seg sum stóru tapararnir, og silvurmerkini í FM kappingini og bronsumerkini í ólavsøkuróðrinum vigaðu sjálvandi lítið og einki - í hvussu so er ikki beinanvegin eftir róðurin. Men nólsoyingar kunnu líta aftur á eitt róðrarár, har teir avgjørt hava verið við til at sett dám á framúr spennandi kapping.

Tá ið 10-mannaførini róðu framvið Molanum var sjón fyri søgn, hvørjir tapararnir hava verið í hesum róðrarárinum. Vestmenningur, sum undan Ólavsøkuni var manningarliga illa fyri, gav skjótt skarvin yvir. Hjá teimum hevur hetta kappingarárið hilnast soleiðis, sum teir høvdu vónað.

Eysturoyingurin og Hoyvíkingurin fingu brúkiligan start. Hoyvíkingurin hekk leingi uppií, men so mistu teir. Eysturoyingarnir vóru treiskir, og teir vóru akkurát ov stuttir í kappingini við Nólsoyingin um bronsuplássið.

Vónbrotið hjá eysturoyingunum kendist ivaleyst serliga meint. Undan Ólavsøkuni vóru tað bara Eysturoyingurin og Havnarbáturin, sum fýra ferðir áður høvdu tikið ímóti ferðasteypinum hjá Fiskasøluni. Nú sóu teir á Eysturoyingi havnarmenninar fara við ferðasteypinum fyri fimtu ferð. Harvið vann Havnarbáturin ferðasteypið til ognar.

Kanska kendi eingin seg sum so stórar taparar, sum teir umborð á Vágbingi mundu gera tað. Frá startskotinum og til einar tíggju metrar frá málstrikuni vóru teir fremstir. Onkra lítla løtu framvið Molanum legði Havnarbáturin upp á síðuna av teimum. Tá kundi tað kanska tóktst sum um, at krútið var uppi. Men so mentu vágbingarnir seg upp og svaraðu aftur og aftur. 25 metrar úr málinum vóru teir kanska hálvan skut fremstir, men teir hildu ikki tørn.

Tá ið sigurin er so mikið tætt undir borðinum og kortini gleppur av hondum, so er einki at siga til, at vónbrotið kennist serliga meint. Men avrikið hjá Vágbingi hesa ferð var staðfesting av, at tað ikki var tilvild, tá ið teir fyrr í summar vunnu í heimasjógvi á Vágsfirði.

## Vinnararnir

Manningin umborð á Havnarbátinum hevði fyrireikað seg so væl, sum tað bar teimum til. Um tað hevði nakran týdning, fer tað ivaleyst at verða tosað nógv og leingi um. Men tað er ein veruleiki, at Havnarbáturin vandi týskvøldið ella tveir og tríggjar dagar eftir, at allir hinir bátarnir fyri síðstu ferð í ár vóru drignir í neystið ella settir á lunnin.

Havnarbáturin fylgdi Vágbinginum, og framvið Molanum høvdu teir orku og styrki til fleiri ferðir at bjóða vágbingum av. Um Havnarbáturin skuldi gerast meistari, so var neyðugt hjá teimum at vinna ella at enda tvey pláss framman fyri Nólsoyingin. Seinna møguleikanum hevði tað verið ov vandamikið at dúva uppá. Tað vistu havnarmenn. Eftir fleiri miseydnaðar royndir at taka Vágbingin høvdu teir 10-15 metrar úr málinum kropsligt og ikki minst sinniligt yvirskot at gera enn eina roynd, og teir megnaðu at taka Vágbingin. Havnarbáturin vann ólavsøkuróðurin og FM kappingina, og avrikið hesa ferð vísti, at teir eru verdugir vinnarar og meistarar.

# Havfrúgvin bjargaði vestmenningum

**Meistararnir av Argjum mistu nógv í spurtinum, sum vestmannadreingir vunnu á tveimum bátum hjá havnarmonnum og tveimum hjá klaksvíkingum**

5-MANNAFØR DREINGIR
*Jóannes Hansen*

Blikur av Argjum er meistari. Tað eru teir, tí teir í fleiri kappingum á rað fingu fult. Teir vunnu ikki á Norðoyastevnu, og sjálvandi var tað stórt vónbrot fyri argjadreingir og nógvu viðhaldsfólkini - ikki minst á Argjahøvda - at tað skuldi hilnast so heilt út av lagi í finaluróðrinum. Fyri fyrstu ferð í teimum sjey FM kappingunum fingu argjadreingir einki stig. Blikur var nummar seks, men argjadreingir, sum hesa ferð tóktust hava fingið gummiarmar, sum tað plagar at vera tikið til, kundu kortini ugga seg við, at teir í kappingunum fyrr í summar høvdu verið so stinnir, at teir høvdu tryggjað sær FM - fyri fyrstu ferð síðani í 1989. Tað ynskja vit teimum enn eina ferð tillukku við.

Vestmenningar plaga at standa seg væl í kappróðri. Hetta summarið hevur verið undantak. Í seks teimum fyrstu kappingunum hevði eingin vestmannabátur vunnið. Tað vildu dreingirnir umborð á Havfrúnni ikki hava sitandi á sær. Teir fingu góðan start, teir vóru við í kappingini um fremsta plássið alla tíðina, og á málinum vóru teir ein stóran skut undan Sílinum.

– Vit hava gjørt heilt nógv við venjingina upp undir Ólavsøku, og sigurin hesa ferð er sera kærkomin. Silvur í FM kappingini og gull á Ólavsøku er tað besta, sum kann hugsast, tá ið vit nú ikki megnaðu at vinna FM, staðfesta fegnu dreingirnir úr Vestmanna.

Sílið hevði góðan start. Havnardreingir róðu ytstir, og tá ið teir komu undir Molan, gekk tað rættuliga væl hjá teimum. Teir fóru framum Havfrúnna, men í síðsta enda var kappingin frá Havfrúnni ov boysin.

Fleiri vóru um boðið um næstfremsta plássið, sum Sílið endaði á. Talan var um báðar bátarnar hjá Havnar Róðrarfelag og báðar bátarnar hjá Klaksvíkar Róðrarfelag. Tekla og Fípan Fagra vóru heilt væl við alla tíðina. Tekla endaði á triðja plássinum, bara reingina aftanfyri Sílið, og Fípan Fagra var skutin aftanfyri Teklu.

Úrslitið hjá Teklu var tað besta í teimum sjey kappingunum í ár. At Fípan Fagra vann bronsu í FM kappingini, og at eisini Tekla stóð seg so væl á Ólavsøku kundi bent á, at framtíðin hjá Klaksvíkar Róðrarfelag ikki sær so galin út.

Á fimta plássinum var Drekin bara ein lítlan skut aftanfyri Fípuna Føgru. Frá honum og aftur til Firvald og meistararnar umborð á Bliki var lítil og eingin munur. Spógvin, sum legði bragdliga fyri og vann á Norðoyastevnu, var fremstur í aftaru røðini, um tað ber til at siga tað soleiðis. At tað gekk væl betri hjá Fípuni Føgru, enn tað gekk hjá Spógvanum hevði við sær, at tað vóru klaksvíksdreingir og ikki teir í róðrarfelagnum NSÍ, sum fingu FM bronsumerkini um hálsin.

**Vikuskifti**

Nr. 143 • leygardagur • 31. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Gunnar trívist á tindunum



síða 4–5



# Lúðraljóð úr ljóðligum látri

**Hans Petur í Brekkunum er aftur á dagsskránni og fløgutøkur og hesaferð snýr tað seg um eina upptøku, sum er gjørd á eini ferð við Norðlýsinum í Klæmintsgjógv fyri ári síðani**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Grottokonsertirnar eru nakað fyri seg og tað er nýggja fløgan hjá Hans P. í Brekkunum eisini. Vakurt og flott at Hans Petur finnur útav at geva hesi útferð eina aðra verð (deminsjón er eitt mótaorð) . Hans Petur verður bara betri og betri.

Hans Petur hevur verið ferð við Norðlýsinum og burturúr er komin ein upptøka í Klæmintsgjógv. Hans Petur er óivað ein hin dugnaligasti blásarin í nýggjari føroyskum tónleiki, hann eigur gávurnar og fram um alt, so er hann fjøltáttaður.

Á fløguni Látraljóð sleppa vit við á eina ferð. Ein ferð og uppliving, sum var gjørd fyri ári síðani.

Men við at taka konsertina upp, er hetta greitt fyri eftirtíðina eisini, og tað er at fegnast um, tí handa konsertin í hellinum hevur verið ein av teimum góðu.

Hans Petur spælir væl á saxofon og hevur góða rødd og á fløguni koma bæði til sín rætt.

Einki er sum summarkvøld við strendur.

Tað er annað lagið á fløguni og tað verður so sanniliga staðfest á fløguni, at hesi kvøld eru nakað fyri seg.

Sum ein mjørkapípa byrjar hann við saxofonini at spæla sær og bergmálið er við frá fyrstu stund í góðum samspæli. Meira og meira verður lagt omaná og einaferð hoyra vit hetta vælkenda lag og seinni eisini I skovnes dybe stille ro.

Sera floltt er tá Hans Petur tekur hornið frá munni og byrjar at leika við røddini, umframt bergmál og saxofon.

Tá fær konsertin ein annan dám og eina løtu eru vit á heiðunum í USA millum indiánar.

Fyrst er sjálvandi bergmál, ið svarar, men seinni finnur Hans Petur uppá at gera hetta til eitt samspæl, ein duo ella kanska trio. Og tað er í veruleikanum flottasti parturin av hesi uppliving.

Jú, grottokonsertirnar eru nakað fyri seg. Tað ber til at seta seg í ein djúpan stól í stovuni og uppliva tað sama, tá ein hevur eina fløgu sum hesa, tí tónleikarin er førur fyri at reisa seg frá fløtu fløguni og geva lurtaranum fleiri løg(!), fleirfalt tónavirksemi.

Og um nakað er grótføroyskt, so er tað hetta.

Eg vildi sagt, at slíkt er nakað, ið er eingangs og skal upplivast. Men eg má boyggja meg og staðfesta, at henda fløgan er nakað, ið skal hoyrast – og upplivast.

Tað eru løtur, har orð ei røkka!